# Soleiðis gekk grindin

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri ella av ymsum ættum og um morgunin regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin turt og sólglottar, men seinnapartin møguliga sirm. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

GRIND

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Nú er einki loyniligt longur og hvussu ein grind verður rikin er goymt á teldu umborð á fleiri bátum, sum reka grind. Kortið sýnir hvussu grindin, sum legði beinini í Klaksvík mánadagin, varð rikin. Tað er plottarin umborð á línubátinum Fiskivarða, sum hevur ódeyðiliggjørt hendan rakstur.

Fiskivarði var næsti bátur at grindini, sum varð funnin seks fjórðingar norður úr Rivtanganum, norðasti tangi á Eysturoynni. Kósin, sum er grøna strikan í kortinum, vísir, at fyrst royndu teir at fáa hana inn í Djúpini og kanska inn á Funningsfjørð. Men grindin var treisk og vildi eystureftir. Eystfall var eisini og tað rak suður í Djúpunum og í Kallsoyarfirði. Svørtu pílarnir vísa rákið.

Komnir eystur um Kallin tók grindin sjógv á bak og beina linjan suður gjøgnum Kallsoyarfjørð vísir, at grindin hevði nógva ferð, og var miðvís í síni svimjing.

Kortið skuldi havt verið við í blaðnum í gjár, tá skrivað var frá grindini, men av misgávum varð tað gloymt. At tøknin er frammarlaga í dag, er hetta kortið eitt dømi um.

Á veg úr grindini týsdagin setti Fiskivarði fólk av í Leirvík og í Fuglafirði.

Beint áðrenn vit vóru komnir norður á Boðar á vegis til Oyndarfjarðar sendu vit hetta kort gjøgnum internetið til Sosialin. Tøkniliga høvdu vit kunna sent myndir frá rakstrinum sum er á kortinum, og tær kundu verið í blaðnum, áðrenn grindin legði beinini.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 23 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 21 |
| Tromsø | 21 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1003 hPa norðan fyri Ísland fer norðureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjakvøldið.




Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani til havið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/08 kl. 06⁰⁰– 22/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 21/08 kl. 06⁰⁰– 22/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 40,6 mm

fik




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

22. aug.: Fullmáni
26. aug.: Mánin longst frá jørðini
31. aug.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. aug | 07.58 | 20.18 | 06.58 | 19.18 | 07.13 | 19.33 | 09.58 | 22.18 | 10.58 | 23.18 | 06.13 | 18.33 | 05.13 | 17.33 | 08.13 | 20.33 | 09.13 | 21.33 | 07.43 | 20.03 | 08.58 | 21.18 |
| 24. aug | 08.39 | 20.58 | 07.39 | 19.58 | 07.54 | 20.13 | 10.39 | 22.58 | 11.39 | 23.58 | 06.54 | 19.13 | 05.54 | 18.13 | 08.54 | 21.13 | 09.54 | 22.13 | 08.24 | 20.43 | 09.39 | 21.58 |
| 25. aug | 09.17 | 21.36 | 08.17 | 20.36 | 08.32 | 20.51 | 11.17 | 23.36 | — | 12.17 | 07.32 | 19.51 | 06.32 | 18.51 | 09.32 | 21.51 | 10.32 | 22.51 | 09.02 | 21.21 | 10.17 | 22.36 |
| 26. aug | 09.55 | 22.12 | 08.55 | 21.12 | 09.10 | 21.27 | 11.55 | — | 00.36 | 12.55 | 08.10 | 20.27 | 07.10 | 19.27 | 10.10 | 22.27 | 11.10 | 23.27 | 09.40 | 21.57 | 10.55 | 23.12 |

5 707265 100050 >